## Ted var tann størsti

-Edward Kennedy var tann størsti senatorurin í okkara tíð, sigur Barack Obama, forseti. -Tað er við stórari sorg, at vit hava fingið deyðsboðini av Edward Kennedy. Við deyða hansara er ein kapittul í søgu okkara at enda komin, sigur Barack Obama við sjónvarpið CNN. Edward Kennedy var dyggur stuðul hjá Obama undir valstríðnum í fjør, og sagt verður, at júst hansara stuðul hevði avgerandi týdning fyri valið. Obama hevur eisini sagt, at hann var sera takksamur fyri stuðulin, og hann rósar honum eisini fyri stríðið fyri mannarætindunum.



## Sjómenn fáa endurgjald

Fakfelagið hjá donskum sjómonnum, 3F Sømændene, vil hava reiðaríið H. Folmer & Co. at rinda fýra sjómonnum knappar tvær milliónir krónur í endurgjaldi. Teir fýra vóru við farmaskipinum Danica White, sum bleiv rænt úti fyri somalisku strondini á sumri í 2007. Í tríggjar mánaðir vóru teir gíslar hjá sjórænarunum, og sambært fakfelagnum hevur hendingin havt álvarssamar avleiðingar fyri menninar. Sambært felagnum kundi reiðaríið tikið stig til at forða sjóráninum, eins og tað kundi havt kunnað manningina betur um vandan fyri sjóráni.

# Útnorðurráðið heldur ársfund í Runavík í dag

**Formaðurin seinasta árið, Kári P. Højgaard, hevur í morgun hildið fráfaringarrøðu, og í hansara stað er valdur Joset Motzfeldt. Seinnapartin í dag vitjar Útnorðurráðið í Norðoyggjum**

ÁRSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í morgun heldur Útnorðurráðið ársfund í nýggja skúlanum við Løkin í Runavík. Kári P. Højgaard letur formanssessin til Joset Motzfeldt*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Týsdagin og í dag er Runavík verið karmur um ársfundin hjá Útnorðurráðnum. Í morgun er ársfundurin við Løkin, seinnapartin verður vitjað í Norðoyggjum, og seinasti partur av vitjanini í Føroyum verður í Havn í morgin.

### Føroyskur dansur

Í gjár fingu gestirnir høvi at vitja ymsastaðni í Runavíkar kommunu, og um kvøldið gekk leiðin út á Røktar-og Ellisheimið, har Tordur J. Niclasen, fyristøðumaður, vísti gestunum heimið og greiddi livandi frá.

Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Magnus Rasmussen, var vertur við døgurða týskvøldið, har gestirnir eisini sluppu at siggja menn í føroyskum búna og fingu eina frágreiðing um søguna hjá føroyska dansinum.

Tá døgurðin var etin, varð farið upp á gólv, og allir luttakararnir komu upp í ringin.

Útlendsku gestirnir búgva á Hotel Runavík, og fundirnir, sum Útnorðurráðið hevur havt, eru hildnir í nýggja skúlanum við Løkin.

### Fráfaringarrøða

Í morgun klokkan 9 byrjaði so sjálvur ársfundurin.

Føroyar hava havt formansskapin í Útnorðurráðnum seinasta árið, har Kári P. Højgaard hevur verið formaður.

Fyrrapartin hevur hann hildið sína fráfaringarrøðu.

Eftir Kára, tekur Joset Motzfeldt við formanssessinum og kemur at sita sum formaður í Útnorðurráðnum til august 2010.

Formanskapurin skiftir árliga millum tey trý limalondini.

### Norðoyggjar

Seinnapartin í dag verður farið á útferð og vitjað verður á Høvdavirkinum í Leirvík, áðrenn farið verður í Norðoyggjar, har Gunvá við Keldu, borgarstjóri og Jógvan Skorheim, varaborgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, taka ímóti.

Mentanarleiðarin hjá kommununi, Dávur Winther, fer klokkan 15.15 at greiða frá um mentan og vinnu í Klaksvík, og klokkan 16 verður vitjað í Christianskirkjuni, har Alex Sólstein fer at siga frá.

Klokkan 16.30 verður farið til Árnafjarðar, og klokkan 16.50 fer Jógvan Høj at siga frá um fiskavirkið Norðfra.

Føroya Bjór fer at greiða útnorðurgestunum frá sínum virksemi klokkan 17, og har verður tað Símun Gullaksen, sum verður frásøgufólk.

Klokkan 18.30 verður farið úr aftur Klaksvík og til Fuglafjarðar, har døgurði verður á Muntra klokkan 19.

Í morgin verða so útnorðurfólkini í Havn.

# Fyrstu vinnuligu farmaskipini sigla gjøgnum Landnyrðingssmoguna

**Alheimsupphitingin letur nú upp arktisku landnyrðingssmoguna millum Evropa og Asiu fyri vinnuligari skipaferðslu**

SKIPAFERÐSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



Tvey ísstyrkt farmaskip nýta júst nú smoguna sum snarveg millum Suðurkorea og Holland. Tað skrivar heimasíðan hjá Ingeniøren.

Týska reiðaríið Beluga úr Bremen fær æruna av at víga eina nýggja tíð við altjóða vinnuligari skipaferðslu á teirri arktisku landnyrðingssmoguni, ið orsakað av at heimurin hitnar nú er opin fyri sigling í summarmánaðunum.

Beluga hevur júst fingið loyvi frá russiskum myndugleikum at sigla leiðina, ið er fram við longu russisku norðurstrondini. Hetta er fyrstu ferð at russiskir myndugleikar lata eitt slíkt loyvi. Higartil hava bert russiskir ísbrótarar og kavbátar havt henda møguleika.

Tey bæði týsku skipini eru kortsíðan farin úr russiska havnabýnum Vladivostok og eru byrjað flutningin av tungum sergóðsi úr Busan í Suðurkorea til Rotterdam í Hollandi.

Reiðarin, Niels Stolberg, staðfestir, at sjálvt um alheimsupphitingin týðiliga hevur umfatandi neilig árin fyri klótuna, er dømið við landnyrðingssmoguni eisini eitt týðiligt jaligt árin av henni.

- Við at nýta Landnyrðingssmoguna kunnu vit fremja eina øgiliga minking í oljunýtsluni og harvið eisini spara Heimin fyri javnt stórt $CO_2$-útlát, umframt onnur skaðilig útlát, sigur Niels Stolberg við tíðindastovuna Reuters. Hann vísir á, at snarvegurin umvegis Arktis styttir leiðina millum Asia og Evropa við 4000 sjómílum samanborið við vanligu leiðina umvegisa Suez veitina. Tann leiðin er knøpp 11.000 sjómíl úr Busan til Rotterdam.